gult cyan magenta svart

Gó›i veljari

Ey›gunn Samuelsen
b‡rá›slimur

Eg haldi, ta› hevur stóran t‡dning, hvør i› ver›ur valdur í komandi b‡rá›, serliga tí hetta ávirkar okkum so nógv í gerandisdegnum.

Eg haldi, at eg, eftir førimuni, havi roynt at gjørt eitt gott arbei›i og fingi› sjónliggjørt hina helvtina av politikkinum. Ta› i› eg meini vi›, er sosiala – og mentunnarøki›. Hesi økir hava veri› forsømd í nógv ár. Ta› vísir seg, at eru ongar kvinnur vi› so koma hesi økir í a›ru rø›.

Mál i› eg m.a. havi arbeitt fyri:

• Mylnuhúsi›,

• Øking av dagrøktini vi› 40 plássum

• N‡ggi stovnurin á Kjalarvegnum

• Ziskatrø-vi›líkahald/Ósáskúlin – grundøki

• Sosiala deild er nú sett á stovn aftur

• Betra korini hjá barnaverndini. Sosialrá›gevi settur fulla tí›.

• Útvega hølir til stu›lar hjá børnum vi› serligum tørvi.

• Sett pening av til spælistovu hjá dagrøktini til komandi ár.

• Tiltøk fyri tey eldru.

Ein persónur ger onki einsamallur !! men eg havi roynt ta› i› eg havi veri› ment, vi› at koma vi› uppskotum og at ávirka tær avger›ir i› hava veri› tiknar.

Mál i› eg fari at arbei›a fyri:

• Ra›festa trivna›in í b‡num

• Øll børn skulu hava ansingarpláss

• N‡ggjar bøkur/tilfar í skúlan

• Allar gamlar bøkur vekk

• Fleiri teldur í skúlan

• Mentunnarhúsi› Atlantis fáast at virka !!

Heldur tú at hetta arbei›i er vert at stu›la, so vil eg fegin halda fram!

200 n‡ggj barnagar›spláss komandi ár

Elin Lindenskov,
b‡rá›slimur
www.lindenskov.com

Á fíggjarætlanini fyri 2001 eru 81.424.000 krónur settar av til barnagar›søki›. Tórshavnar B‡rá› samtykti fíggjarætlanina fyri komandi ár í t‡skvøldi›. Til barnagar›søki› eru settar 81.424.000 krónur í mun til 46.482.000 í ár – írokna› tær 15 milliónirnar, sum landi› fyrr hevur goldi›. Hækkingin inniber m. a. eina øking av dagstovnatilbo›um, solei›is at umlei› 200 børnum afturat fáa pláss komandi ár.

Umframt tey 200 plássini komandi ár byrja 52 onnur børn í n‡ggjum plássum nú um dagarnar.

Útibarnagar›urin í Framhúsinum til 16 børn lat upp 1. november 2000.

B‡lingshúsi› millum Gilja til 20 børn lat upp 1. november 2000.

Útibarnagar›urin á Hvítanesi til 16 børn byrjar 20. november 2000.

Útibarnagar›urin í Skótahúsi Sigmund Brestirsonar til 20 børn byrjar 2 januar. 2001.

B‡lingshúsi› á Ternuryggi til 20 børn byrjar 2. januar 2001

Hesi plássini koma, tí Javna›arflokkurin hevur lei›sluna í sosialu nevnd og alla tí›ina hevur virka› fyri, at barnagar›størvurin ver›ur nøkta›ur 100%.Hetta er fyrsta stigi›

Grundstykkir uttan útgjald

Hendrik Thomsen

Um b‡rá›spolitikarar meina naka› vi› ta›, tá teir siga seg vilja loysa íbú›artrupulleikarnar, hev›i ta› veri› eitt gott hugskot, at borgararnir fingu grundøki› til leigu í eitt áramál.Tá grundøki› kostar fleiri 100 túsum krónur at keypa, vil ta› taka nógv ár hjá teimum flestu at spara upp til eitt grundstykki.

Um ein skipan ver›ur gjørd, har grundøkini eru leiga› frá komununi í t. d 99 ár, hev›i ta› veri› vi› til at tálma› húsaspekulatiónini, og b‡rá›i› vildi ikki havt so stórar trupulleikar, um broytingar skulu gerast á økinum.

Hesin møguleiki kundi so komi› afturat øllum hinum loysnunum, sum valevnir og verandi b‡ráslimir hava lova› nú upp undir vali›.

Gev keisaranum ta› sum keisarans er



Sverre Midjord

Dánial av Rana, i› nú hevur stu›la› borgarligu meirilutanum í 16 ár, hevur eitt aftursvar til mín vi›víkjandi einari grein eg skriva›i til útspilling av Tvøroyri, i› skriva› var av Óla Breckmann í Dagbla›num. At tann dagur so skuldi upprenna, at Dánjal av Rana bleiv verji hjá Óla Breckmann, hvør skuldi trú› tí? Men ta› er so mangt, i› er løgi, hesin sami persónur, sum nokta›i limunum í Fylking atkvø›urætt, tí hesir vóru fyltir 67 ár, ja hesin bi›ur nú um atkvø›ur frá somu persónum, hóast hann er blivin 75.

Grannsko›anarvi›merkingin, eg tá vísti til, er bein, og í henni er øll vi›urskifti – eisini tá eg leg›i frá mær sum b‡rá›sforma›ur, írokna› ta› tú tosar um høllina í Trongisvági. Vi›víkjandi hesi høll, tú og tínir samstarvsfelagar nú í nógv ár hava havt so ilt av, er hóast alt til allar borgarar, og ikki sum mi›b‡urin, i› tú hevur gjørt í dag, i› bert er gáva til ein persón, og rokningina 3,5 mió, hana skulu allir borgarar gjalda.

Tat at tú og Bergur hava passa› teir borgarligu skógvarnar, ta› vita vit øll á Tvøroyri, tey vita eisini, hvat ta› hevur kosta›. Verja tín er veit, tí tú gloymir helst vi› vilja, men eitt skalt út vita, tann vanligi veljarin gloymir ikki.

Tær 13 milliónurnar, i› brúktar vóru á Drelnesi vóru partur av tí tilskoti, i› spart var› upp av havnarstudningi, vit spardu eisini tá tú var vi›, men ta› er nú einafer› so, at eftir spararan kemur oy›arin — ja, hvør minnist ikki Dánial bara 400.000 krónur fyri at lata porri› upp á samlistø›ini hjá IRF í Trongisvági — og nú er ta› eg ikki minnist meira, hvør var ta›, i› fekk peningin.

Tú var forma›ur í kommununi og har megna›i tú at avrei›a flakavirki› hjá okkum efitr einari nátt, ja 10 milliónir upp á eina nátt. Hvat hvørdu vit ikki veri› betri staddir, u vit høvdu okkara egna virki.

Skipasmi›jan er títt ver aleina, hvussu sær hon út í dag, og hvar eru tólini, i› har vóru? Nautilus kropsvenjingarstø›in, ein serlig søga, fyri at keypa hesa har tú brúkti 6 milliónir, ja so skuldi tú fáa eit surimivirki afturfyri, hvar er hetta surimivirki? Jú, giott er keypt, Dánial.

Úr Nykredit tóku tit eitt lán upp á 20 milliónir, i› skuldi n‡tast til umfígging, alt hetta beliv brúkt til yvirforbrúk.

Og ikki at gloyma, hvat vi› láninum úr Fossbankanum upp á 500.000 krónur, i› sendar vóru einum Mr. J. K. Howart á Gibraltar, hesin ókendi ma›ur skuldi eitast at vera tyín persónligi rá›gevi spurt bleiv til hvat, men einki svar. Pengarnir vóru tiknir sum lán, fluttir til Gibraltar, har ongin kennir hendan persón.

Mær tykis, at tú er blivin gloymskur, helst vi› vilja. Tann tí›in vit bá›ir umsótu Tvøroyrar kommunu var ein uppbyggingartí›, vit uppbygdu n‡tt kaiøki, n‡tt flakavirki, n‡ggj skip ta› veri seg Su›ring, Rankan o. O. N‡ggjan skúla, og ítróttarhøll í Trongisvági, jú sanniliga var hetta uppbyggingartí›. Men hvat eiga vit í dag, Dánial av Rana? Púrasta einki. Alt hetta hava tú og tínir samstarvsfelagar slept okkum av hondum — og ikki nokk vi› tí, nú noyddist tit eisini at bi›a um 13 milliónir í kreppuhjálp, jú skundi tykkum uttanlands aftur at fer›ast upp á kommununnar rokning.

Nei Dánila, svari› nú heldur grannsko›aranum, nú hesin vil hava at vita, hvat allar hesar fer›aútrei›slur til uttanlandsfer›ir eru brúktar til, men svari› er jú einfalt »fattige er de find«.

Nei, Dánial, ítróttarhøllina í Trongisvági er høvrt mansbarn í sókni gla› og stolt yvir, hetta er ogn teirra og sum tey eisini hava goldi› fyri. Men hvat vi› andlitslyftingini í mmi›b‡num, jú 3,5 mió til skattgjaldaran at gjalda og bert gáva til ein persón, og tá eg sigi bert til ein persón, so er hetta sambært tí sáttmála, tit hava gjørt vi› Gudmund Mortensen, har tit tann 6/7 í 1998 hava bundi› tykkum til at ongin annar má fáa handilsloyvi á økinum. Solei›is hava tit umsiti› ognirnar hjá kommununi, vi› at ognartaka frá ø›rum til at geva summum.

Annars var ætlan mín til hetta val at vi›gera framtí›ina, men eg skilji, at tú Dánjal, er fåí fer› vi› at skriva minningarrit, og um ta› er ta› tú ætlar at brúka f‡ra tey komandi árini í b‡rá›num til – so vælgagnist.

Nei Dánial — munur er á uppbygging og avtofting.

Tey gomlu mugu eisini hava ta› gott

Ingrid Jacobsen
Valevni Javna›arfloksins

Seinnu árini hevur gingi› framá á flest øllum økjum í Tórshavnar kommunu.

Vinnulívi› blomstrar. Ítrótturin hevur gó› kor at virka undir. Ábøtur og útbyggingar ver›a alsamt gjørdar á vegir og havnir.

Øki eru ´to, i› ikki hava gó›ar sømdir í kommununi. Hetta er serliga á eldraøkinum, barnaansingarøkinum og sosiala økinum sum heild, har skjotar og fjøltátta›ar ábøtur eru ney›ugar.

Í frálíka eldraálitinum, sum Tórshavnar kommuna í desember 1999 gav út, ver›a livikorini hjá eldru borgarunum gjølliga vi›gjørd. Har ver›ur m. a. víst á,

• at íbú›ar- og røktartørvurin hjá teimum eldru og óhjálpnu als ikki eru nøktandi

• at brúk er fyri fleiri umlættingarplássum,

• at døgnrøktarskipan má setast á stovn,

• at fleiri dagtilhaldspláss mugu fáast til vega,

• at venjingarstovnur, har tey eldru og óhjálpnu kunnu fáa ókeypis tilbo› um kropsliga uppvenjing hjá fysioterapeuti/ergoterapeuti, má stovnast…

Tórshavnar kommuna má ra›festa sosiala øki›/eldraøki› nógv hægri enn gjørt hevur veri› seinnu árini, og krevur hetta sjálvstagt, at játtanin til øki› ver›ur munandi økt.

Fari› væl um landsstovnarnar



Magni Dalsgaard,
vælevni til B‡rá›i› í Havn

Jógvan vi› Keldu hevur skilt hvussu nógv landsstovnar tí›a fyri ein b‡. Hann og borgarnir í Klaksvík berjast fyri at var›veita hesar stovnar, og fáa fleiri afturat. Hetta er rætti hugbur›urin.

Tórshavnar kommuna eigur at fara væl um stovnarnar hjá Landinum. At gera gó›a tilkoyring, gó› parkeringsvi›urskifti, gott busssamband, gó›ar barnaansingarmøguleikar og at planta nærindis hesum stovnum, so starvsfólki› merkir at tey eru vælkomin til hendan b‡.

X vi› lista C

Vikuskifti

Nr. 223 • leygardagur • 18. november 2000 • 74. árgangur • www.sosialurin.fo

Sigrun G. Niclasen:
Listin vísir hvør tú ert
sí›a 18-19

Or›i› og mó›urmáli›

Petur S. Simonsen bey› sunnukvøldi› vælkomin til Samfelagsmøti, sum eisini vór›i útvarpa›i

SAMFELAGSMØTI Upprunaliga vóru ta› menn - tveir úrmælingar - sum brendu fyri at fáa Or›i› á mó›urmálinum. Hetta átti ikki at veri› eitt klandursmál í dag. Mó›urmáli› er so avgjørt stóri vinnarin, sigur Petur S. Simonsen í samrø›u

Birgir Kruse

Sunnkvøldi› bjó›a›i tú áhoyrarum í Ítróttarhøllini á Hálsi í Havn eins og útvarpslurtarum kring alt landi› vælkomnum til "Samfelagsmøti" í Ebenezer. Hvussu mong mundu hoyra teg og ta›, i› ví›ari fór fram?

Í Høllini á Hálsi mundu vera umlei› 1400 fólk. Hvussu nógv lurta kring landi› er ilt at siga, men eg havi varhugan av, at nógv fólk lurta eftir kristiligum sendingum. Ta› skuldi tí ikki undra› meg, at Útvarpi› var frá í nógvum heimum, bilum og umbor› á skipum.

Ofta ver›ur sagt, at ta› sum fær fólk í hópatali at savnast, ta› er í hvussu er mentan - samdur?

Mentan er eitt av hugtøkunum, sum flest øll hava eina meining um, men har fá eru samd. Øll eru helst samd um, at list er partur av mentanini. Men vit kunnu helst eisini tala um mentan innan ymisk onnur øki. Ta› kann í summum førum vera ilt at skilja millum "vanar og si›ir" og so mentan. Og kanska er ta› solei›is, at tá naka› er vor›i› si›venja, so er ta› eisini ein mentan. Í so máta mega vit siga, at samfelagsmøtini eru ein partur av mentanini hjá brø›rasamkomunum - ikki tí at so mong savnast, men tí at tey savnast á hvørjum ári hesa ársins tí›.

Hvør er skráin vi› sovori› høvi›?

Samfelagsmøtini eru vanliga løgd í eina fasta skrá, ikki minst tey, sum eru í Høllini á Hálsi. Tvs., at bæ›i byrjan, endi, talarar, felagssangur og sersangur er skipa›. Og munur er eisini á skránni og innihaldinum, um ta› er eitt "uppbyggingarmøti" ella ta› er ein evnageliskur fundur.

Finnast forskriftir fyri hvussu trúgvandi, ella ein samkoma, eiga at savnast?

Neyvan nakar torir vi› Bíbliuni í hond siga, at HETTA er einasta rætta fyriskipanin hvussu tey trúgvandi skulu savnast. Men ta› finnast meginreglur í N‡ggja Testamenti, serliga í brøvunum, um samkomuvi›urskifti, sum brø›rasamkomurnar meina eru grundleggjandi, og tí hava skipa› seg, sum tær nú vanliga gera. Eitt nú bóklingurin "Bibilskar grundreglur fyri at savnast" eftir A. P. Gibbs, sum P.R.Poulsen umsetti, roynir at l‡sa hesi vi›urskifti.

Tú fæst dagliga vi› bøkur, eg hugsi um Landsmi›stø›ina fyri Undirvísingarambo› har tú ert lei›ari; er bókin sum vit higartil hava kent hana, besti og hollasti mi›il at útbrei›a kristnanina og vi›urksifti tengd afturat trúgv, ella liva vit í tí›um, har meiri ágangandi mi›lar eiga at ver›a umhugsa›ir, eisini á hesum øki?

Hvør mi›il er hollastur at bera gle›ibo›skapin velst um, hvar tú ert í ver›ini og hvønn tú vendir tær til. Í Føroyum er samskifti mann og mann í millum - samrø›an og atfer›in - kanska virknasti hátturin. Og arbei›i› millum børn og ung í sunnudagsskúla og á summarlegum er eisini av stór… m t‡dningi í so máta. Kirkjur g samkomur hava gó›a umstø›r í vørpunum og eg trúgvi, at › hjá mongum er einasta samandi› vi› gudstænastur og møti, og er tí av alstórum t‡dngi fyri kristnilívi› hjá mongm. Hvat fer fram á alnótini, veit g ikki rættiliga, men havi varugan av, at ta› mangan ver›ur l kjak fyri at kjakast. Men loynkamari›, tá tu ert einsamallur i› Bíbliuni, eini bók, ella ø›rm lesna›i og hevur fri› til rundan og bøn hevur og fer ltí› at hava stóran t‡dning í rú›arlívinum.

Sjálvur eri eg ikki so nógv fyri , sum er meiri ágangandi. Men it eru so ymisk, bæ›i sendari og móttakari.

Føroyska "Drotningabíblian" i› vinjettum hjá Margretu Drotning ver›ur nú at fáa. Fert í at keypa hana?

Ta› kundi væl hent.

Hvat heldur tú um at vit hava tvær Bíbliu-t‡›ingar? Ger ta› máli› bert ríkari, ella er hetta eitt klandursmál?

Upprunaliga vóru ta› menn - tveir úrmælingar - sum brendu fyri at fáa Or›i› á mó›urmálinum. At strí› tók seg upp í sambandi vi› útgávuna hjá Victori er kanska ikki so løgi›. Hetta var ein kollvelting í føroyskum trú›arlívi og eitt óvanligt málsligt eins og mentunarligt avrik framt av eini eldsál, sum hoyrdi til ein trú›arligan minniluta. Slíkar hendingar hava oftast eftirskjálvtar. Hetta átti ikki at veri› eitt klandursmál í dag. Mó›urmáli› er so avgjørt stóri vinnarin.

gult cyan magenta svart